# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Marknagil eigur eisini at umfata Studentaskúlan

Alt ov ofta síggja vit, at góðar loysnir fyri føroyska samfelagið verða blokeraðar av smølum seráhugamálum. Vit síggja tað í kjakinum um, hvussu samfelagsútbyggingin skal fara fram, og hvar ymisk ting skulu liggja. Tað er ikki altíð, at tað eru smáu økini ella útjaðarin, ið vilja fremja seráhugamál í andsøgn við bestu samfelagsloysnina.

Eitt margháttligt mál um lokal seráhugamál liggur mitt í høvuðsstaðnum.

Mitt í høvuðsstaðnum liggur ein skilagóð ætlan um ein skúladepil við Marknagil, har ætlanin er at savna Tekniska Skúla og Handilsskúlan í ein og sama depil. Hetta sparir rakstur og vil skapa fyrimunir við at kunna samskipa lærugreinar og harvið geva størri útboð til næmingarnar, sum hóast alt eru teir, sum tað heila snýr seg um. Alt í alt ein skilagóð ætlan, sum burdi verið framd skjótast gjørligt.

Tó er eitt, sum manglar. Hin stóri miðnámsskúlin í høvuðsstaðnum, Føroya studentaskúli og HF Skeið, vil ikki gerast partur av ætlaða Skúladeplinum. Hann vil sleppa at vera verandi í Hoydølum. Grundgevingarnar eru ymiskar. Summi vilja vera við, at studentaskúlin er so nógv øðrvísi enn hinir skúlarnir, og tí stendur seg best við at liggja einsamallur. Hetta burdi ikki verið so, eftiersum bæði Tekniski Skúli og Handilsskúlin lata prógv, sum eru á sama støði sum tey, ið Studentaskúlin letur. Eisini hevur verið ført fram, at skúlin ikki má flytast úr náttúruperluni í Hoydølum, har hann hevur ligið í dekadur. Slíkar grundgevingarnar eru ikki haldgóðar. Tað eru sama grundgeving, sum man hevur hoyrt, tá almennar skrivstovur o.a. hava verið afturlatnar úti á bygdunum. At okkurt hevur ligið á einum stað í áratíggjur, er ikki nóg góð grund til ikki at flyta, um nú rakstrarligir og fakligir fyrimunir eru við at flyta virksemið.

Tað er sjálvsagt, at studentaskúlin eisini skal vera partur av nýggja skúladepilinum í Marknagili. Tað má sigast at vera politiskt ryggloysi, at man ikki hevur gjørt hetta púra greitt fyri teimum, ið vara av studentaskúlanum í Hoydølum. Tað ber ikki til, at skattgjaldarin skal brúka nógvar milliónir eyka uppá skúlabygging í Hoydølum, bara tí at summi ikki vilja flyta úr einum staði í Havnini í eitt annað. Henda samgongan hevur ikki víst rygg í hesum máli. Vónandi fer tann næsta at gera tað.

Hvussu skal tað vera at flyta skúlar og almennar tænastur kring landið, tá vit, vegna seráhugamál, ikki fáa framt eina sjálvsagda skúlaflyting innanbýggja í Havnini? Og hvør sigur, at vit fáa ein verri studentaskúla fyri tað. Vit eru eisini tvingað til í framtíðini, skal blokkurin minkast ella droppast, sum nógvir politikarar vilja tað, at skipa skúlaútbyggingar, soleiðis at vit sleppa undan dupultfunktiónum. Hetta mál eigur at verða týðandi partur av komandi valstríði.

**Sosialurin**

## Er vána úrslitið av PISA – kanningini ein fylgja av málsligari happing?

REGIN EIKHÓLM



Tað kom neyvan óvart á nakran, at føroysku børnini kláraðu seg minni væl í PISA-kanningini, men tað er alt ov lætt at leggja alla ábyrgdina á lærarar, hølisviðurskiftir og ústýr anners. Orsøkin er helst meiri fundamental enn so, nevniliga tann málsligi samskiftistrupulleikin og hurlivasin innan fakterminologiina.

Tann málsligi samskiftistrupulleikin er íkomin tí verandi føroyska skriftmálið ikki nøktandi umboðar føroyska málið, men í alt størri mun líkist einum nýføroyskum esperanto, ið meiri fremmandager enn upplýsir. Børn og vaksin hava mangan ilt við at skilja sítt "egna" mál í hesi nýføroysku esperanto útgávuni og kunnu tí lætt enda sum funktionellir analfabetar.

Hyggja vit eftir fakmálinum í matematik, fysik, kemi, biologi ella geografi so stendur enntá verri til. Mangan er ongin associasiónsmøguleiki ella hugsamband millum fakmálið, sum vit vanliga kenna tað og sum londini uttan um okkum brúka og hetta babylonska nýføroyska fakmálið, ið uttan nakra lógarheimild verður kroyst niður yvir børnini. Foreldur, ið annars eru vanliga dugnalig og ynskja at hjálpa sínum børnum, standa mangan líka so spyrjandi sum børnini. Hetta er onki minni enn grov  málslig happing at taka móðurmálið fra fólki, og er helst eisini brot á vanlig mannarættindi. Avleiðingarnar av at einsrætta og heilavaska onnur kenna vit frá søguni, so kanska áttu vit at steðga hesum málsliga ørskapinum, áðrenn størri skaði hendir. Útsøgnin hjá eysturríska filosoffinum Ludvig Wittgenstein (1889-1951) um at eingin kann hugsa longri enn hann hevur mál til, tykist tíverri at raka føroysku børnini í ólukku máta, fremmandagjørd á sínum egna máli.

Samanbera vit úrslitið av PISA-kanningini við eitt nú føroysk tónleika avrik, so er stórur munur. Úrmælingar úr Eysturoynni hava júst vunnið eitt heimsmeistara heiti í London, men teir hava heldur ikki purismuna at sláast við.

Ein glotti er tó at hóma. André Niclasen gav í summar út bók ið hann nevnir: FØROYA MÁL Á MANNA MUNNI – móðurmálið og málrøkt. Eitt kærkomið íkast til málsligt ríkidømi fyri tey sum ynskja eitt relevant, livandi og viðkomandi nútíðar føroyskt mál. – bæði í skrift og talu.

## Hvønn skal eg velja, kall ella kvinnu?

ELIN VANG

Aftan fyri ein hvønn succesríkan mann stendur ein kvinna

Í gomlum tíðum var greitt uppgávubýti millum mann og kvinnu. Maðurin skaffaði føði og pening til heimið, og hevði tey álitisstørvini sum vóru uttanfyri heimið. Kvinnan hevði ábyrgd av at matgera, halda reinføri, ansa børnum og hava umsorgan fyri gomlum og óhjálpnum í familjuni. Tá tíðirnar broyttist var væntandi, at alt fór at gerast lættari. Hjá monnum var uppgávubýtið tað sama sum altíð: skaffa pening og føði til familjuna og passa álitisstørv uttanfyri heimið. Tá kvinnurnar fóru út á arbeiðsmarknaðin gjørdist stóri spurningurin: Hvør skal ansa børnum, gomlum og óhjálpnum? Jú, í fyrstani var tað langommur, ommur, mostrar, fastrar, systrar og døtrar, inntil tær so eisini fóru út á arbeiðsmarknaðin. So hvørt sum kommunurnar fingu kvinnuliga umboðan, komu barnagarðar og kommunal barnaansing. At enda kom heimahjálpin, og fungeraði ómetaliga væl í fleiri ár. Tær tóku sær av sjúkum, gomlum og óhjálpnum í egnum heimi. Men tá myndugleikarnir so skuldu spara pening – og løgtingið onga kvinnuliga umboðan hevði – gekk tað fer eftir fer út yvir heimarøktina, so tað gjørdist ein stór skomm. So komu eldrasambýlini, her hildu myndugleikarnir helst, at tað var bíligari at savna gomul fólk saman. Tað einasta hesi gomlu fólkini høvdu í felag var, at tey eru gomul. Tíbetur komu røktarheimini. Vælútbúgvin fólk røkta tey gomlu og óhjálpnu. Næstan øll hesi starvsfólkini eru kvinnur, og tey hava enn onga umboðan á tingi. Nú skal sparast aftur, skorið verður niður av starvsfólki fer eftir fer, og kvinnurnar renna skjótari enn kvinnur nakrantíð hava runnið.

Góðu kvinnur, komið fram, stillið tykkum undir liðina á manninum, og veljið eina kvinnu inn á ting!

## Útsøgn stendur fyri mína egnu rokning

BJØRK OLSEN



Vísandi til grein á portal. fo 1. januar 2008 "Fólkafloksungdómur fyri skrásettum parlag" vil eg gera vart við, at úttalilsið stóð fyri mína egnu rokning. Portal.fo vísti til kjak.fo, har eg í eini viðmerking segði mína meining um eitt nú skrásett parlag. Eg sum forkvinna í HUXA tosaði ikki fyri ungmannafelagið, men tað var mín egna meining. HUXA er eitt felag, har vit á teimum etisku økjunum hava okkara egnu sannføringar. Vit eru ymisk og hava ymiskar hugsjónir á teimum etisku økjunum.

Annars vil eg ynskja øllum eitt gott nýggjár og takka fyri tað brátt farna.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.